**SEMJA**

**MILLUM**

**FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG**
**OG**
**STARVSMANNAFELAGIÐ**

Omanfyri nevndu partar eru í dag samdir um at leingja sáttmálan fyri Føroya Tele til 1. januar 2023 við niðanfyri standandi broytingum:

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

   - 1. januar 2021 hækkar lønin við 1,5375%.
   - 1. januar 2022 hækkar lønin fyrst við 0,5125% roknað av lønini ultimo 2020, og við støði í hesum hækkar lønin síðani við 1,25%.

2. Í grein 4, stk 2, 1. brot verður orðið 'felagsálitisfólkið' broytt til 'álitisfólkið'.

   Grein 4 stk. 3 verður strikað.

   Í grein 4, stk. 4 verður orðið 'felagsálitisfólk' broytt til 'álitisfólk' í øllum vendingum og bendingum.

3. Í grein 5, stk. 2 verða 5 mánaðir broyttir til 6 mánaðir.

   Eisini verður sett inn eitt nýtt stk. 5 í grein 5, sum ljóðar soleiðis:

   *"Avtalur um fyribilsstørv, avloysarar og onnur størv, ið eru avmarkað í tíð, skulu vera nágreiniligar og skrivligar. Avtalur skulu vera gjørdar við starvsfólkið áðrenn setan".*

   Fylgjandi stk. í grein 5 broyta nummar samsvarandi.

4. Í grein 6, stk. 6 verður orðingin í 3. broti *"sendast"* broytt til *"latast"*.

   Verandi orðing í grein 6, stk. 7 verður strikað og nýggj orðing sett inn:

   *"Tá fólk fer úr starvi, verður starvsváttan útflýggjað eftir fyrispurningi."*

5. Grein 15, stk. 2 verður strikað.

6. Í grein 21 verður henda broyting framd. Orðingin:

   *"2) Er arbeiðstíðin millum ½ og 2/3 arbeiðstíð um dagin, verður mattíðin ½ tími."*

   verður broytt til:

   *"2) Er arbeiðstíðin ½ arbeiðstíð um dagin ella meira, verður mattíðin ½ tími."*

KL

Fylgjandi orðing verður strikað:

*"3) Er arbeiðstíðin 2/3 ella omanfyri um dagin verður mattíðin 1 tími."*

7. Í grein 22 stk. 8 verður 23. lønarstig broytt til 25. lønarstig.

8. Í grein 28 verða stk. 9, 10 og 11 strikað, og í stk. 4a verður orðið 'menningarsamrøða' broytt til 'starvssamrøða'.

9. Í grein 34 verður "*1. januar 2019*" broytt til "*1. januar 2021*" og "*1. januar 2021*" broytt til "*1. januar 2023*".

**Tórshavn, 8. desember 2020**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Kristoffur Laksá

**Fyri Starvsmannafelagið**

Súni Selfoss / Anna Johannesen

Noomi K. Rasmussen

Jónleif Jørgensen